FYLGISKJAL 7

Hanna D. Andreassen

Fra: Sveinur Tróndarson <sveinur@dimma.fo>
Sendt: Monday, January 25, 2021 15:29
Til: Alda Joensen; Eirikur Lindenskov; Jonhard Hammer; johann@nordlysid.fo; Eyðun Mortensen; Sveinur Tróndarson
Emne: Re: TIL HOYRINGAR: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um miðlastuðul. Longd freist
Vedhæftede filer: 20210125 Mentamálaráðið hoyringssvar.pdf

Góðan dag, Alda.

Fyrst og fremst takk fyri, at tað lat seg gera at útseta freistina fyri at svara hoyringsskrivinum.

Viðheft er svar frá teimum trimum føroysku bløðunum uppá hoyringsskriv í samband við ætlanirnar at broyta løgtingslógina um miðlastuðul.

Dimmalætting, Norðlýsið og Sosialurin hava gjørt av at koma við einum felags svari, og tað er tað, sum eg viðhefti her.

Avrit av hesum meyli fer bæði til Sosialin og til Norðlýsið.

Vh,
S!

Sveinur Tróndarson
Ábyrgdarblaðstjóri/Editor in Chief
Tinghúsvegur 40-42
100 Tórshavn
Telefon: +298 281126
Teldupostur: sveinur@dimma.fo

On Thu, 21 Jan 2021 at 12:33, Alda Joensen <AldaJ@ummr.fo> wrote:

Góðu hoyringarpartar

Eftir áheitan er freistin longd, hetta til **mánadagin 25. januar 2021.**

Vinaliga/Sincerely

Alda Joensen

Dimmalætting, Norðlýsið og Sosialurin

Mentamálaráðið
100 Tórshavn

Att: Alda Joensen

Hoyringssvar til uppskot um løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um miðlastuðul

Mentamálaráðið hevur biðið miðlar og onnur um at gera viðmerkingar til ætlanirnar um at broyta lógina um miðlastuðul. Sambært uppskotinum ætlar landsstýrismaðurin at broyta leistin fyri, hvussu miðlastuðulin verður veittur. "Tað skal tryggjast, at miðlastuðulin livir upp til tað endamál, hann er ætlaður til. Síðan 2017 er játtan sett av á fíggjarlógini til tess at hækka dygdina í journalistiska arbeiðinum og at tryggja eitt fjøltáttað útboð av tíðindamiðlum. Mett verður ikki, at verandi leistur fyri býtið av miðlastuðlinum tryggjar dygdina í journalistiska arbeiðinum í nóg stóran mun. Tí verður skotið upp at áseta nýggjan leist í lógina, ið byggir á umsóknir um ávísar verkætlanir", stendur at lesa í uppskotinum.

Har stendur eisini, at endamálið við broytingaruppskotinum er at tryggja, at "miðlastuðulin verður býttur út eftir nýggjum leisti, sum skal vera við til at hækka dygdina í journalistiska arbeiðinum. Miðlarnir skulu við miðlastuðlinum fáa møguleika fyri at fara í dýpdina og skapa tilfar av høgari góðsku. Treytir fyri stuðlinum skulu ásetast í kunngerð, og krøv til umsóknina verða ásett, eitt nú um verkætlanarlýsing, undir hesum, hugskot og førleikar hjá umsøkjara. Ásettar verða eisini reglur fyri vav av verkætlan, t.e. at væntandi verður eitt minstamark og eitt hægstamark sett fyri tíðina, ein verkætlan, ið fær stuðul, kann vara.

Orsøkin til broytingaruppskotið er, at landsstýrismaðurin ikki metir, "at verandi skipan fremur størri dygd í miðlunum, og at miðlalandslagið sum heild er vorðið betur fyri. Tí verður lagt upp fyri at fara yvir til verkætlanarstuðul, har dygdargóðar journalistiskar verkætlanir fáa lut í stuðlinum."

Við broyttu lógini, har miðlar heldur enn at søkja um eina upphædd einaferð um árið, skulu søkja um smærri upphæddir fleiri ferðir um árið, væntar landsstýrismaðurin, at vit automatiskt fáa betri miðlar.

Dimmalætting, Norðlýsið og Sosialurin

Dimmalætting, Norðlýsið og Sosialurin hava valt at hava eitt felags hoyringssvar til ætlanirnar hjá landsstýrismanninum, og fyri at taka samanum alt fyri eitt, so mæla vit landsstýrismanninum frá at gera ætlaðu broytingarnar.

Tað eru tað fleiri orsøkir til. Ein er, at vit als ikki eru samd við landsstýrismanninum um, at ein nýggj skipan við verkætlanarstuðuli fer at geva betrið miðlar enn verandi skipan við rakstrarstuðuli. Tvørturímóti. Sum støðan er nú, søkja vit einaferð um árið, men vera broytingarnar settar í gildi skulu vit søkja fleiri ferðir um árið, og tað hava vit hvørki umsiting ella orku til. Føroysku miðlafyritøkurnar eru ógvuliga smáar í vavi, ikki bara, tá tað snýr seg um redaktiónirnar, tí eisini umsitingarnar hjá okkum eru øgiliga smáar. Tí fer ein økt arbeiðsbyrða á hesum øki at hava við sær munandi øktar útreiðslur, og tað gevur slett onga meining.

Ein onnur orsøk til, at vit ikki eru samd við landsstýrismanninum, er, at uppskotið hevur ógvusligar fíggjarligar avleiðingar fyri bløðini. Síðan lógin um miðlastuðul varð samtykt í mars 2017 – og ikki í 2016, sum tað stendur í uppskotinum – hevur Posta hækkað kostnaðin fyri útberingina av bløðum so nógv, at ein øgiliga stórur partur av miðlastuðlinum, fyri ikki at siga allur, er endaður í kassanum hjá Posta. Tann kostnaðarøkingin verður ikki strikað hóast lógin um miðlastuðul verður broytt, og tí endar tað við, at bløðini standa eftir við einari stórar útreiðslu – upp á nógvar 100.000 krónur tilsamans.

Ein triðja orsøk er, at fyriliggjandi uppskot bara byggir á metingar hjá landsstýrismanninum um, hvussu vit fáa betur miðlar í Føroyum. Her er einki kanningararbeiði gjørt fyri at finna útav, um tað veruliga er ein møguleiki fyri at tað hongur soleiðis saman, sum landsstýrismaðurin sigur. Eingin, hvørki landsstýrismaðurin sjálvur ella nakar frá Mentamálaráðnum, hevur nakrantíð vent sær til okkara við spurningum um nakað sum helst. Hvørki hvussu støðan hjá okkum er ella fyri at hvørji sjónarmið okkara, um møguligar broytingar, eru. Tað er tó ikki tí, at hann ikki kennir okkara støðu. Ei heldur tí, at hann ikki kennir avleiðingarnar av broytingunum, sum hann ætlar at fáa Løgtingið at samtykkja. Av tí, at vit longu á vári í fjør fingu frænir av ætlanunum, fingu vit ein fund í lag við landsstýrismannin, har vit av okkara eintingum gjørdu vart við okkara sjónarmið og møguligar avleiðingar av broytingunum. Hesin fundur í september mánað í fjør, men nú uppskotið er sent okkum til hoyringar kunnu vit staðfesta, at einki av tí, sum vit løgdu fram á fundinum, er tikið við.

Ein fjórða orsøk er, at uppskotið frá landsstýrismanninum kemur alt ov seint. Fíggjarárið 2021 er longu byrjað, og tí má uppskotið upp á ein ella annan máta fáast skjótt ígjøgnum Løgtingið, um ætlanin hjá landsstýrismanninum, um, at miðlarnir skulu søkja fleiri ferðir um árið, eisini

Dimmalætting, Norðlýsið og Sosialurin

skulu galda fyri í ár. Men akkurát tað gevur onga meining, tí eftir okkara tykki er lítið høpi í hesum uppskotinum. Eitt annað er , at sum støðan er beint nú, hava vit ongar ábendingar um, hvørjum fortreytum vit skulu søkja eftir, og í skrivandi løtu hava vita vit heldur ikki, um tað, sum vit prenta áðrenn broytingarnar vera settar í gildi gevur rætt til stuðul ella ikki. Lógarteksturin ber í øllum førum á tað borðið, at prentaður tekstur ikki hevur rætt til stuðul, tí sambært uppskotinum skal miðlastuðulsnevndin góðkenna tilfarið áðrenn tað verður prentað ella sent. Tí er eisini ein beinleiðis vandi fyri, at Løgtingið fer at samtykkja nakað, sum fer at gera nógv størri skaða enn gagn.

Ístaðin fyri at fara víðari við hesum nýggja uppskotinum mæla vit heldur landsstýrismanninum til at fylgja tilmælinum í álitinum frá meirilutanum í Mentanarnevndini hjá Løgtinginum, tá hon viðgjørdi uppskotið til lógina, sum nú er í gildi. Í álitinum, sum er dagfest 28. februar 2017 stendur at "Meirilutin metir, at tað er skilagott at endurskoða virknaðin av miðlastuðlinum regluliga, og mælir til, at hendan lóg verður endurskoðað aftaná fýra ára virknað.

Hetta, sum nú liggur á borðinum er ikki ein endurskoðan. Hetta er eitt broytingaruppskot, har landsstýrismaðurin við mentamálum av sínum eintingum, og uttan at lurta eftir teimum, sum vera rakt av broytingunum, kemur við einari heilt nýggjari skipan. Einari skipan, sum ongantíð er roynd her hjá okkum. Einari skipan, sum fer at kosta bløðunum dýrt, tí tað, sum kemur inn í miðlastuðli, er longu farið útaftur í øktum kostnaði – til almenna partafelagið Posta, har landsstýrið einsamalt eigur allan partapeningin.

Dimmalætting, Norðlýsið og Sosialurin

Miðlastuðulsskipanir kring okkum

Hyggja vit eftir, hvørjar skipanir eru galdandi fyri miðlar í londunum kring okkum, so kunnu vit í stuttum staðfesta, at føroyskir miðlar í ólukkumát eru eftirbátar á hesum øki.

Bæði í Danmark, Noregi, Svøríki, Grønlandi, Finlandi, Íslandi, Eysturríki og í Fraklandi[1] hava tey skipanir sum stuðla miðlunum. Felags fyri øll londini er, at bløðini sleppa undan at gjalda MVG av seldum bløðum, og tann skipanin er eisini galdandi her í Føroyum. Harumframt hava tey í flestu londunum eisini havt beinleiðis rakstarstuðul, sum er tað sama, sum føroyskir miðlar hava fingið síðan 2017. Munurin er bara, at til dømis í Noregi, Danmark og Svøríki hava hesar skipanir verið galdandi síðan mitt í seinastu øld.

Orsøkin til, at myndugleikarnir í nevndu londunum lata miðlastuðul, er at skapa eitt fjølbroytt útboð av samfelagsligum og mentanarligum tíðindum við tí fyri eyga at styrkja fólkaræði og tað fólkaræðisliga kjakið í londunum.

Í ár veitir danska stjórnin miðlunum 358 milliónir krónur at býta, og har er skipanin skrúvað soleiðis saman, at sjálvt teir heilt stóru miðlarnir, sum JP-Politikens Hus, sum millum annað umfatar Jyllands Posten, Politiken og Ekstra Blaðið, fær umleið 56 milliónir krónur í stuðuli. Henda fyritøka hevði í 2019 eitt avlop uppá 350 milliónir krónur fyri skatt. Eingin einstakur miðil kann tó fáa meira enn 17,5 milliónir krónur um árið, Information og Kristeligt Dagblad eru tó undantikin, tí tey fáa í ár ávikavist 25 og 28,5 milliónir krónur í beinleiðis rakstrarstuðuli.

Í Svøríki er størsta upphæddin til ein einstakan miðil 40 milliónir krónur, men tann upphæddin var hægri í 2020, og verður tað eisini í 2021, tí tá fáa miðlarnir koronastuðul omaná. Samlað brúkar svenska stjórnin 580 milliónir til beinleiðis rakstrarstuðul til miðlarnar í ár.

Í Noregi er skipanin á leið tann sama, sum í hinum báðum stóru norðurlondunum. Stjórnin rindar 318 milliónir krónur í beinleiðis rakstrarstuðuli og harumframt fáa miðlarnir eisini óbeinleiðis stuðul umframt at tað eru fleiri aðrar stuðulsskipanir, sum teir kunnu søkja eftir. Í Noregi er hægsta stuðulsupphæddin til ein einstakan miðil meira enn 42 milliónir krónur um árið.

Íslendsku miðlarnir hava ikki fingið nakran stuðul í nógv ár, men í fjør gjørdi stjórnin av at seta eina stuðulsskipan í verk, sum svarar til slakar 20 milliónir krónur føroyskar krónur. Umroknað

[1] https://www.regjeringen.no/contentassets/7dec1c0ee86149bda8f69b256beaa202/nn-no/pdfs/stm201820190017000dddpdfs.pdf

Dimmalætting, Norðlýsið og Sosialurin

til føroysk viðurskifti eftir fólkatalið svarar upphæddin til slakar fýra milliónir krónur. Koronastøðan var høvuðsorsøkin til, at miðlastuðul varð settur í gildi í Íslandi, men nú verður arbeitt við at fáa gjørt skipanina varandi.

Grønlendsku myndugleikarnir hava eisini í fleiri ár veitt miðlastuðul, um enn har bara er tann eini privati miðilin, og upphæddin har hevur verið hægri enn tað, sum føroyski landskassin hevur rindað til allar føroysku miðlarnar. Hetta er tó broytt eitt sindur nú av tí, at Sermitsiaq eisini skrivar á donskum. Tað hevur við sær, at miðilin kann fáa danskan miðlastuðul, og tað hevur Sermitsiaq søkt um og fingið fyri 2021. Upphæddin til Sermitsiaq í ár er 3,5 milliónir krónur í donskum miðlastuðuli. Harumframt kann blaðið søkja um eina góða millión hjá grønlendsku myndugleikunum eisini. Alt hetta skal síggjast í samanhangi við, at miðlafyritøkan í 2019 hevði eitt avlop uppá 5,1 milliónir krónur fyri skatt.

Verandi lóg

Slíkar umstøður hava føroyskir miðlar ongantíð havt. Roynt hevur verið í fleiri umførum at fáa eina stuðulsskipan upp á beinini, men tað eydnaðist ikki fyrr enn í 2017.

Ella tað er bara lutvíst rætt. Tí stuðulin til politisku flokkarnar, tað sum vit í dag kenna sum stuðul til politiska upplýsing, varð, tá bløðini enn vóru politisk, brúktur til bløðini. Men, tá bløðini sum frá leið hvurvu ella vórðu slitin frá flokkunum, hvarv stuðulin eisini frá bløðunum.

Tí var tað eitt stórt framstig, tá Løgtingið í mars 2017 samtykti lógina um miðlastuðul. Tilgongdin at fáa hesa stuðulsskipan upp at standa tók fleiri ár, tí fyrstu royndirnar at fáa eina skipan upp at standa – hesaferð – vórðu gjørdar av samgonguni sum sat frá 2011 til 2015. Tær miseydnaðust og so kom lógin ikki fyrr enn í mars 2017 við virknaði frá 1. januar 2017.

Samanbera vit umstøðurnar hjá føroysku miðlunum við umstøðurnar hjá miðlunum í okkara grannalondum, so er týðiligt, at munurin er øgiliga stórur. Upphæddirnar, sum danskir, svenskir og norskir – og grønlendskir – myndugleikar rinda sínum miðlum, eru, eisini lutfalsliga, nógv hægri enn upphæddin, sum føroyskir miðlar fáa at býta.

Veruleikin er tann, at byrjanarkostnaðirnir hjá føroysku bløðunum í øllum førum eru teir somu, sum teir eru hjá miðlunum í okkara grannalondum, ivaleyst væl hægri. Avbjóðingin hjá okkum

er, at vit hava nógv færri eintøk at býta hesar kostnaðir út á, og tí er eindarkostnaðurin hjá føroysku bløðunum uppá seg nógv hægri enn hann er hjá miðlum í londunum kring um okkum.

Í so máta kunnu vit nokk bara samanbera okkum við Grønland, har stuðulsupphæddin til ein einstakan miðil fer tvær og eina hálva ferðir upphæddina, sum allir privatir føroyskir miðlar fáa at býta.

Lógin um miðlastuðul, Ll. 35/2017, ásetur, at 40 prosent av árligu játtanini verður latin sum ein føst grundarupphædd, sum verður býtt javnt millum allar miðlar. Harumframt vera 60 prosent latin sum ein lutfalslig upphædd í prosentum av skjalprógvaðum lønarútreiðslum.

Tað kann væl vera, at hesar ásetingar kundu verið gjørdar øðrvísi, ella at skipanin kundi verið samansett á annan hátt. Hetta hevði tað eisini borið til at gjørt nakað við, um politiska landslagið arbeiddi saman við miðlunum um at finna eina aðra skipan.

Hetta kundi verið gjørt við einari endurskoðan, har tað eisini var hugt eftir, hvussu skipanirnar virka í øðrum londum, og, ikki minst, hvat endamálið við stuðulsskipanunum í hinum londunum er.

Hetta uppskotið, sum nú liggur á borðinum, er tó ikki ein endurskoðan. Hetta er eitt heilt nýtt uppskot, sum grundleggjandi fer at broyta stuðulsskipanina, og avleiðingin av hesi broyting, um hon verður samtykt, er, at bløðini standa eftir við einari stórari eykarokning, sum er komin inn eftir, at lógin um miðlastuðul varð samtykt í 2017. Í hesum tíðarskeiði hevur Posta hækkað postgjaldið fyri útbering av bløðum, so tað í dag er 60 prosent dýrari at fáa vikuskiftisbløðini út til haldararnar. Og næstan tríggjar ferðir so dýrt at fáa bløðini í hvørt hús.

Til samanberingar er útberingarkostnaðurin hjá stóru handilsfyritøkunum, sum prenta egin lýsingarbløð, ikki hækkaður á leið tað sama. Posta vil ikki siga okkum, hvør tann kostnaðurin er, ei heldur, hvussu stór príshækkingin er, og tað vilja handilsfyritøkurnar sjálvandi heldur ikki. Tað eru trúnaðarupplýsingar hava vit fingið at vita. Men vit hava tó fingið eina ábending um, at tann príshækkingin er nógv lægri enn okkara.

Júst hesin munur hevur longu fingið ávirkan fyri Sosialin, sum er steðgaður við mikudagsblaðnum. Orsøkin er tann einfalda, at postgjaldið er vorðið so høgt, at tað ikki longur hongur saman fíggjarliga at gera blaðið. Avleiðingin av tí er, at fólk eru søgd úr starvi.

Dimmalætting, Norðlýsið og Sosialurin

Ta avleiðingina kann hetta uppskotið eisini fáa. Uppskotið hevur við sær, at miðlastuðulin, sum vit kenna hann í dag hvørvur, og tað hevur eitt fíggjarlig hol við sær fyri bløðini. Tað ávirkar ikki bara bløðini, sum koyra við einum øgiliga lágum blussi beint nú. Tað fær eisini ávirkan á prentsmiðjurnar, sum fáa minni og minni at gera, so hvørt sum bløðini bara tódna og tódna.

Ein vánalig loysn

Uppskotið, sum vit hava fingið til ummælis, kann eftir okkara tykki slett ikki brúkast. Hyggja vit rundan um okkum, so leggja grannalondini dent á at hava beinleiðis rakstrarstuðul, tí tað er tað, sum kann styrkja grundarlagið undir bløðunum – og miðlunum í heila tikið – mest.

Grønlendsku myndugleikarnir hava roynt hesa skipanina fyri nøkrum árum síðan, men har vóru tey kortini so mikið at sær komin, at tey bara tóku 40 prosent av játtanini til verkætlanarstuðul. Tá fyrsta árið var um at fara, kundu myndugleikarnir staðfesta, at eingin umsókn um verkætlanarstuðul var komin inn, og tí gjørdi politiska skipanin av at flyta játtanina aftur til rakstrarstuðul. Tað einasta, sum ein slík skipan fer at hava við sær, er meira umsiting hjá øllum miðlunum, og tað er ikki tað, sum vit hava tørv á. Í dag søkja vit einaferð um árið, við nýggju skipanini er ætlanin at vit skulu søkja fleiri ferðir um árið. Tað vil siga, at blaðleiðslurnar mugu taka tíð burtur frá tí, sum tað snýr seg um, nevniliga at gera bløð, til at skrúva verkætlanir saman og til at søkja um stuðul til hesar verkætlanir.

Fyri at gera ilt verri, er ætlanin við nýggju skipanini, at útgjaldingin av stuðlinum skal vera í tveimum. Ein part, tá verkætlanin byrjar, og restina, tá verkætlanin er liðug og er eftirmett.

Men hvat merkir tað? Merkir tað, at miðlastuðulsnevndin kann taka eina tilsøgn aftur, til dømis, tá greinarøðin er liðug, tí hon kanska kortini ikki var nøktandi? Hendir tað, so hevur tað við sær, at miðlarnir fara undir verkætlanir undir skeivum – ella í øllum førum ótryggum – fortreytum. Tá hava teir sett fólk at gera eina uppgávu, sum miðilin kanska slett ikki fær stuðul til allíkavæl. Men útreiðslurnar eru har kortini.

Um tað er so, vita vit ikki, tí alt uppskotið er øgiliga leyst. Vit vita slett ikki, hvørjar tankar landsstýrismaðurin hevur á økinum, og vit síggja tað heldur ikki í hesum uppskotinum. Har stendur bara, at ein skipan skal finnast, men kortini vita vit, at miðlastuðulsnevndin skal hava fasta samsýning heldur enn fundarpengar, tí hon nú skal hava fleiri fundir um árið.

Dimmalætting, Norðlýsið og Sosialurin

Flyta redigeringsrættin

Eitt annað, sum liggur okkum nógv á hjarta er, at uppskotið hjá landsstýrismanninum fer at hava við sær, at miðlarnir missa rættin til at gera av, hvat skal prentast ella sendast í teirra miðli.

Uppskotið leggur upp til, at miðlarnir skulu seta uppskot um verkætlanir saman, so skulu teir søkja um stuðul frá Miðlastuðulsnevndini, sum síðan ger av, um uppskotið er nóg gott til at fáa stuðul ella ikki.

Siga vit, at miðilin hevur biðið fólk uttanífrá gera verkætlanina, so hevur tað við sær, at miðilin skal bera eina eykaútreiðslu fyri at fáa tilfarið í. Um tað nú er so, at stuðulsnevndin, sum jú er politiskt vald, tí tað er tann til eina og hvørja tíð sitandi landsstýrismaður, sum setur nevndina, sigur nei, tí tey ikki halda hugskotini vera nóg góð, ja, so er kemur tilfarið ikki í miðilin.

Tað vil siga, at so verður tað ikki blaðstjórnin, redaktørurin, sum er tann, sum hevur ábyrgdina av innihaldinum í blaðnum, sum ger av, hvat skal í tann miðilin, men ein politiskt vald nevnd, sum ein tilvildarligur landsstýrismaður hevur valt.

Ein slík skipan smakkar okkum óvanliga illa, og hon hoyrir heldur ongastaðni heima fyri at siga tað stutt.

Í øllum øðrum framkomnum londum eru tað miðlarnir sjálvir – og brúkararnir sum brúka og keypa tænasturnar – sum gera av, hvat skal í blaðið. Redaktiónsleiðslan fyrst, men tíma brúkararnir ikki at keypa tað, ja, so má redaktiónsleiðslan laga seg eftir tí og broyta innihaldið.

Væntandi innlit

Tað kemur óvart á okkum, at landsstýrismaðurin og Mentamálaráðið leggja upp til, at skipa miðlastuðulin á sama hátt, sum annar stuðul á mentanarøkinum.

Í so máta er so øgiliga stórur munur á, hvussu hesar skipanirnar virka, tí blaðframleiðsla ella miðlaframleiðsla yvirhøvur, kann ikki á nakran hátt samanberast við eitt nú bókaútgávu, sum er nógv drúgvari, og eisini er samansett á ein heilt annan hátt.

Dimmalætting, Norðlýsið og Sosialurin

Í heila tikið er gerandisdagurin hjá einum miðli so nógv øðrvísi samansettur, at tað mest av øllum bendir á vantandi innlit at leggja upp til eina miðlastuðulsskipan, har dentur verður lagdur á verkætlanarstuðul heldur enn rakstrarstuðul. Tað er ein orsøk til, at londini kring okkum senda ein øgiliga stóran part av miðlastuðlinum út sum beinleiðis miðlastuðul, har søkt verður einaferð um árið.

Tann, sum bara hevur fylgt eitt pinkalítið sindur við veit, at tað er ógvuliga sjáldan, at greinarøðir í miðlunum vara longri enn seks vikur. Gera tær tað, missa fólk áhugan, og so gevur tað ikki meining at gera tær.

Siga vit, at vit skulu koyra við slíkum verkætlanum, so merkir tað, at miðlarnir í hvørjum einstøkum føri skulu søkja um eina upphædd, sum liggur ímillum 50 og 100.000 krónur, og kanska lægri enn tað. Tá verður tað øgiliga smátt og tá verður tað øgiliga nógv umsiting í hvørjum einstøkum føri.

Hetta hava føroyskir miðlar slett ikki orku til og tað átti Mentamálaráðið at vita. Tí tit hava fingið tað at vita frá okkum – á fundi í ráðnum tann 23. september í fjør og á Løgmansskrivstovuni tann 14. januar í ár.

Onnur stuðla, tað eiga vit eisini

Hyggja vit aftur eftir miðlastuðulsskipanunum í okkara grannalondum so síggja vit, at tey velja at styrkja fjølbroytni í miðlalandsslagnum við at veita miðlunum ein beinleiðis rakstrarstuðul.

Tað var eisini endamálið við føroysku lógini um miðlastuðul, tá hon kom í gildi í 2017, men í so máta røkkur upphæddin alt ov stutt. Samlað fáa miðlarnir tvær milliónir krónur at býta, og siga vit, at tað skal brúkast til at gjalda løn eftir hægsta satsi, so røkkur tað bara umleið fýra journalistiskt starvsfólk. Og tá tað eru sjey – tað hava verið átta – miðlar, sum býta stuðulin ímillum sín, so verður tað smábýtt hjá miðlunum.

Men hetta verður ikki betri, um farið nú verður yvir til eina verkætlanarskipan. Tí tá mugu miðlarnir søkja eftir fólki, antin til verkætlanirnar sjálvar, ella til at avloysa fyri tey føstu, sum skulu gera verkætlanaruppgávur, og so verður tað upp aftur dýrari. Tí kemur eitt starvsfólk á eina redaktión bara í nakrar mánaðir, so mugu vit rokna við, at kostnaðurin fyri tey verður uppaftur hægri. Harumframt skulu eisini leggjast aðrar útreiðslur afturat, so sum frítíðarløn av tí at talan

Dimmalætting, Norðlýsið og Sosialurin

nú verður um leyst knýtt fólk og annað, sum kann knýtast at verkætlanini. Og so er samlaða talið av journalistum, sum skulu gera føroyskar miðlar betri enn lægri.

Tí er tað eftir okkara bestu sannføring ógvuliga bláoygt av landsstýrismanninum at halda, at ein skipan við verkætlanarstuðuli fer at gera føroyskar miðlar nakað betur yvirhøvur. Hon fer at gera føroysku bløðini munandi veikari og hon fer – kanska – at gera onkran einstakan miðil, sum tímir at brúka orku til at søkja um stuðul, sterkari.

Ístaðin átti landsstýrismaðurin – ella øll politiska skipanin – at tikið seg saman, og sett eina munagóða stuðulsskipan í verk, sum veruliga styrkti føroyska miðlalandslagið. Hevði upphæddin, uppá tvær milliónir, til dømis verið ferfaldað, so kundu miðlarnir, bæði bløð, útvørp og netmiðlar, sett fleiri journalistar í fast starv, og so høvdu vit veruliga styrkt journalistiska fakið og fjølbroytni í miðlunum.

Tað hevði eisini styrkt um kappingini við KvF. Tí eisini tað er neyðugt. Tað skal ikki gerast soleiðis, at KvF skal minkast ella gerast veikari, tað skal gerast við at stuðla hinum miðlunum. Júst sum tey gera í londunum rundan um okkum.

Onkuntíð tykist tað, sum eru vit meira katólsk enn pávin, tá vit tosa um stuðul. Tí tað ljóðar á tosinum, at einki skal stuðlast. Men tað er ein sannroynd, at landskassin rindar stuðul til ávísar vinnur. Millum annað landbúnaðarstuðul og tá skip verða bygd í Føroyum. Hví so ikki eisini fyri at styrkja føroyskar miðlar?

Eingir aðrir miðlar í heiminum brúka orku uppá føroyska samfelagið. Tað gera bara vit sjálvi, og tað má politiska skipanin eisini viðurkenna. Júst sum man ger í grannalondum okkara.

Nógvir møguleikar – hetta er tó ikki ein teirra

Sjálvt um verandi lóg eftir okkara tykki gott kundi verið betur, serliga tá vit tosa um upphæddina, so er hon so nógv betur fyri allar partar enn tað uppskotið, sum vit og onnur hava fingið til hoyringar.

Tað er eingin ivi um at tað hevði verið rætt at endurskoðað verandi lóg, men so eigur tað at vera gjørt í einum størri og øðrvísi forummi, har miðlarnir og politiska skipanin í heila tikið, vera tikin við í fyrireikandi arbeiði.

Dimmalætting, Norðlýsið og Sosialurin

Hetta uppskotið, sum landsstýrismaðurin arbeiðir við, fer ikki at gera støðuna hjá føroyskum miðlum betur. Tvørturímóti fer tað at gera hana munandi verri, og tí mæla vit honum til at taka uppskotið aftur og byrja av nýggjum.

Vit eru altíð til reiðar at geva okkara íkast til, hvussu vit halda, at hetta skal skipast og gerast.

Tórhavn, tann 25. januar 2021

Vegna Dimmalætting, Norðlýsið og Sosialin



Sveinur Tróndarson,
Ábyrgdarblaðstjóri, Dimmalætting

Jóhann Lützen,
Ábyrgdarblaðstjóri, Norðlýsið

Eirikur Lindenskov,
Ábyrgdarblaðstjóri, Sosialurin

Jonhard Hammer,
Stjóri, Sosialurin